# LEIKSKRÁ

2. UMFAR

17. MAI 2020

BLAÐ NR. 01




MYND: JUUL'S FOTO

HAVNAR BÓLTFELAG 1904

HAVSBRÚN

## VÆLKOMIN TIL DYST Í FLØTUGERÐI

betri DEILDIN

# Innihald


Dysturin í dag ..... 4
Hagtøl fyri Betri-deildina hjá monnum ..... 8
Liðuppsetingin hjá ÍF og HB ..... 10
Leikarin hesaferð ..... 14
Nevndin hjá ÍF ..... 18
Seinasti dysturin ..... 20
ÍF-sangurin ..... 22



**ÍF**, Ítróttarfelag Fuglafjarðar, 530 Fuglafjørður, tel. 228771, if@if.fo, www.if.fo.
**Útgevari:** ÍF-fótbóltur. **Ábyrgd:** ÍF-fótbóltur. **Uppsetan:** Maibritt P. Bærentsen.



**Leiðandi reiðarí**
**í norðurhøvum**




VARÐIN
P/F Varðin | Garðabrekka 4 | FO-510 Gøtu | Tel 610600
vardin@vardin.fo | www.vardin.fo





HAVSBRÚN

P/F Havsbrún • P.O. Boks 81 • 530 Fuglafjørður • tel. 41 44 00 • fax 41 44 01
havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fi



TEKST:
EIVIN BREIÐASKARÐ

# Dysturin í dag

Nú er Betrideildin 2020 endiliga farin í gongd, og í dag bjóða við stórfelagnum úr høvuðstaðnum HB vælkomnum til Fuglafjarðar.

Aftaná frálíka 2-1 sigurin á útivølli í 1. umfari leygardagin 9.maj, munnu flestu ÍF-fjepparar hava ein vón um, at okkara dreingir fáa 3 stig á kontoina í dag.

Síðstu árini hava vit havt tað trupult ímóti HB, bæði á heimavølli og útivølli. Tí verður spennandi, um hetta „nýggja" ÍF-liðið, við fleiri nýggjum profilum, kann gera nakað við sterka gestaliðið í dag.

Tað eru nógvar broytingar á báðum liðum til kappingarárið 2020. ÍF hevur mist nakrar leikarar í mun til í fjør, men hevur so ístaðinfyri fingið 5-6 profilar, sum eiga og óiva fara at lyfta okkara lið longur uppeftir á stigatalvuni.

HB hevur eisini mist leikarar í mun til í fjør. Teir hava so eisini verið úti eftir nýggjum leikarum og nýggjum venjara, sum óiva fara at styrkja munandi um teirra lið, og tær ætlanir, sum HB altíð hevur. Fyri hetta stóra felagið úr Gundadali er tað bert meistarheitið, sum er gott nokk.

Tað hevði verið super, um vit í dag fáa sett í gongd eina góða gongd á heimavøllinum í Fløtugerði. Nokk er tað á heimavølli, at vit skulu skava flestu stigini saman. Tó havi eg eina kennslu av, at vit í ár hava eitt munandi sterkari lið enn í fjør, tá ið úrtøkan varð sera soltin yvirhøvur og serliga á heimavølli. Í kappingarárinum 2019 megnaðu vit bert at fáa 3 stig burturúr á heimavølli, og tað varð enntá við 3 javnleikum.

Kom nú dreingir. Vísi gestunum, at í ár verður tað sera trupult fyri útiliðini at fáa nakað sum helst burturúr í Fløtugerði. Her bestemma vit. Koyr á!!!!!!

*Góðan dyst øll somul*












SPEKT
løggildir grannskoðarar
Tórshavn
Staravegur 17
Tel. 34 34 34
Klaksvík
Stangaskákið 1
Tel. 34 34 35
spekt@spekt.fo
www.spekt.fo
Heildarloysn fyri kappingarføran prís
Lætt og ómakaleyst
XBRL, skatt, bókhald, MVG, roknskap og annað
Nú eisini skrivstovu í Klaksvík
Sjálvuppgáva
TAKS
Ring ella les meira um okkara heildarloysnir á www.spekt.fo


Brekkutún 4 | 188 Hoyvík | Tel. +298 30 88 00 | torshavn@samskip.com | www.samskip.fo
TÍTT FLUTNINGSFELAG
samskip


Heildaveitari
til sjóvinnuna
Vit umboða hesi merki
Cummins
Bátamotorar
3M PELTOR
Oyravernd
EXIDE BATTERIES
Akkumulatorar
Fronius
Sveisiútgerð, elektrodir, gass
Mobil
Smyrjiolja
Dräger
Filtur, maskur og gassmátarar
CREWSAVER
Solas góðkendir bjargingarvestar og draktir
DSB RFD
Bjargingarbátar
MULLION
Flóti og yvir-livilsisdraktir
· Oljuklútar
· CO2 og onnur køligass
· Sløkkiútgerð og tænasta
Noreqfender
NOREQFENDER
Fønix
Mykinesgøta 8 · Boks 18 · FO-110 Tórshavn · Tel 31 19 09

## 1. UMFAR

KELDA: FAROESOCCER

### Betri-deildin Menn

| NR | LIÐ | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | NSÍ | 1 | 1 | 0 | 0 | 3 | 1 | 2 | 3 |
| 2 | B36 | 1 | 1 | 0 | 0 | 2 | 0 | 2 | 3 |
| 3 | ÍF | 1 | 1 | 0 | 0 | 2 | 1 | 1 | 3 |
| 4 | HB | 1 | 1 | 0 | 0 | 1 | 0 | 1 | 3 |
| 5 | Víkingur | 1 | 0 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 |
| 6 | AB | 1 | 0 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 |
| 7 | Skála | 1 | 0 | 0 | 1 | 0 | 2 | -1 | 0 |
| 8 | EB/Streymur | 1 | 0 | 0 | 1 | 0 | 1 | -1 | 0 |
| 9 | TB | 1 | 0 | 0 | 1 | 1 | 3 | -2 | 0 |
| 10 | KÍ | 1 | 0 | 0 | 1 | 0 | 2 | -2 | 0 |

*Niðurflytingar strikan til 1. deild*

| 2. UMFAR |
|---|
| ÍF - HB |
| B36 - AB |
| Víkingur - Skála |
| EB/Streymur - NSÍ |
| TB - KÍ |

| 3. UMFAR |
|---|
| ÍF - KÍ |
| B36 - Skála |
| AB - HB |
| Víkingur - NSÍ |
| EB/Streymur - TB |

## TOPP 10

KELDA: FAROESOCCER

### MÁLSKJÚTTAR í Betri-deildini

| NR | NAVN | MÁL |
|---|---|---|
| 1 | Uros **Stojanov** **(ÍF)** | 2 |
| 2 | Adrian **Justinussen** **(HB)** | 1 |
| 3 | Aron **Knudsen** **(NSÍ)** | 1 |
| 4 | Betuel **Hansen** **(NSÍ)** | 1 |
| 5 | Klæmint A. **Olsen** **(NSÍ)** | 1 |
| 6 | Meinhard **E. Olsen** **(B36)** | 1 |
| 7 | Poul **Kallsberg** **(Skála)** | 1 |
| 8 | Rógvi **Joensen** **(TB)** | 1 |
| 9 | Sebastian **Pingel** **(B36)** | 1 |






LIÐINI Í DAG

# 2. UMFAR

## ÍF – HB

betri DEILDIN

### ÍF

| | |
|---|---|
| Tóri T. **Traðará (M)** | 1 |
| Jan Ó. **Ellingsgaard (L)** | 3 |
| Jens **Joensen** | 4 |
| Karl **Løkin** | 6 |
| Dánjal **á Lakjuni** | 7 |
| Uros **Stojanov** | 8 |
| Filip **Djordjevic** | 9 |
| Ari Ó. **Ellingsgaard** | 10 |
| Hákun **Edmundsson** | 11 |
| Jákup **N. Olsen (M)** | 13 |
| Gundur E. **Petersen** | 14 |
| Bogi A. **Løkin** | 15 |
| Sámal **Joensen** | 17 |
| Pól Jákup **Lundsbjerg** | 18 |
| Rói **Róin** | 19 |
| Jóhan **Petersen** | 20 |
| Tóri **N. Olsen** | 21 |
| Sjúrður Pauli **Nielsen** | 22 |
| Andy Ó. **Olsen** | 23 |
| Milos **Budakovic (M)** | 25 |
| Ólavur **Larsen** | VENJARI |
| Hans Jørgen **Djurhuus** | VENJARI |
| Pauli **Jarnskor** | MÁLMANSVENJ. |
| Milan **Svojic** | HJÁLPARVENJ. |

**LIÐLEIÐARAR:** TRÚGVI NESÁ, ÓLAVUR ELLINGSGAARD, POUL N. MIKKELSEN OG PALLI VANG
**FYSIO:** HANUS ELIASEN, ÁLVUR HANSEN OG JÓNFRÍÐ HANSEN

### HB

| | |
|---|---|
| 1 | Teitur M. **Gestsson (M)** |
| 3 | Jógvan Rói **Davidsen (L)** |
| 4 | Heðin **Hansen** |
| 5 | Delphin **Tshiembe** |
| 6 | Daniel **Johansen** |
| 7 | Adrian R. **Justinussen** |
| 8 | Dan **í Soylu** |
| 9 | Tróndur **Jensen** |
| 10 | René Shaki **Joensen** |
| 11 | Pætur J. **Petersen** |
| 14 | Jákup L. **Thomsen** |
| 15 | Heri H. **Mohr** |
| 16 | Jákup **Højgaard (M)** |
| 17 | Bartal **Wardum** |
| 18 | Mathias **Nygaard** |
| 19 | Hørður **Askham** |
| 20 | Ási P. **Dam** |
| 21 | Mikkel **Frankoch** |
| 22 | Dánjal **Reginsson** |
| 23 | Hanus Pauli **Danielsen** |
| 25 | Øssur M. **Dalbúð** |
| 27 | Teit **Jacobsen** |
| 28 | Samuel J. **Chukwudi** |
| VENJARI | Jens Berthel **Askou** |
| HJÁLPARVENJ. | Kevin **Schindler** |
| FYSISKUR VENJ. | Sebastian **Dam** |
| FYSISKUR VENJ. | Óla Hendrik **av Fløtum** |

**LIÐLEIÐARAR:** HEÐIN WEIHE OG UNI NIELSEN
**LÆKNI:** TORMÓÐUR STÓRÁ. **FYSIO:** JÓAN MAGNUS DALBØ

| | |
|---|---|
| DÓMARI | Kári J. **á Høvdanum** |
| HJÁLPARDÓMARAR | 1. Arni **Rasmussen** / 2. Kristian Gunnar **Joensen** |
| 4. DÓMARI | Rúni **Gaardbo** |
| EYGLEIÐARI | Jón Kári **í Brekkuni** |

**BÓLTSTUÐUL:** EIVIN S. BREIÐASKARÐ



MOWI

FAROE ISLANDS

RINKA

FINEST SALMON

CRAFTED BY NATURE



**FULLKOMILEIKIN HEVUR EITT NAVN.** Hon eitur Rinka.
Hon er sterk. Sjáldsama vøkur. Rinka veksur seg til í Føroyum og verður myndað av brimi og kyrru. Tað er hetta, sum ger hana til heimsins besta laks.
Handfarin við nærlagni. Handfarin av náttúruni.

Hetta er Rinka. Laksur úr Føroyum frá Mowi.

**RINKA.FO**


Sjóbusiness
Góð sambond síðan 1919
FAROE SHIP


Green Marine Divers
Tlf.: +298 77 00 60


teknistovan GØTA
Jens Kl. Jacobsen
Far.: jkj 232343
Henning Olsen
Far.: ho 232344
FO 510 Gøta tel. 442344 teknistovan@teknistovan.fo www.teknistovan.fo


sansir.fo
Heildar-
loysnir
frá
ArtiCon
BANKNORDIK
ARTICON
Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo

4

LEIKARIN

# JENS JOENSEN

TEKST OG MYND: ATLI PETERSEN

## TÚ

**Navn:** Jens Joensen
**Føðingardagur:** 17.05.1989
**Føðistað:** Tórshavn
**Starv:** Timburmaður
**Pláss á vøllinum:** Miðverji
**Yvirtrúgv:** Havi so øgiliga nógv, best er einki at nevna.
**3 orð sum lýsa teg:** Ábyrgdarfullur, róligur og seriøsur.
**Torførasti mótstøðumaður:** Ari Ellingsgaard
**Frítíðarítriv:** Dart
**Vónir fyri 2020:** Tær eru góðar. Vit hava ein góðan hóp, so tað verður spennandi hvussu tað fer at spæla av.

## TÍN ÍTRÓTT:

**Fyrsti dystur á 1. liðið:** Einaferð í 2008 á Skála
**Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF:** Tað var fyrsta umfar ímóti Skála í ár, har vit vunnu 2-1.
**Aðrar ítróttargreinar:** Hondbólt, dart og NFL.
**Minningarríkasti dystur:** Vunnu 5-3 á ÍF eitt fríggjakvøld, har Karl skapti rok eftir dystin.
**Størstu fótbóltsliga ávirkan:** Eingin
**Besti fótbóltsleikari:** Bjartalíð bleiv seinast valdur, men eg haldi ikki at hann er best.
**Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt:** Hondbólt
**Hvat slag av venjing dámar tær best:** Har tvey mál eru uppi í.
**Hvat slag av venjing dámar tær ikki:** Renna og taktiskar venjingar.

## TÍNIR FAVORITTAR:

**Matur og drekka:** Ræst kjøt, ræstur fiskur, riv, havhest, kjálkar og ein køld Kondi.
**Slag av tónleiki:** Rockur frá 60. 70 og 80unum. Favoritturin er The Eagles.
**Sjónvarpssending:** NFL sunnukvøld.
**At slappa av:** Sofan við konuni undir liðini.

**Troyggja nr.:** 4 havi eg fingið lovað.
**Besti fótbóltsleikari nakrantíð:** Messi.
**Sjónvarp/filmstjørna:** David Hasselhoff, helst í Baywatch tíðini.
**Besta bók/blað:** Norðlýsið (LOL).
**Stuttligasti persónur:** John Sigurd Joensen
**Stuttligasti í hópinum:** Milan Svojic er nógv tann stuttligasti.
**Besti ÍF áskoðari:** Trúgvi Nesá




## FAKTA UM JENS

Sjálvt um Jens ikki kom til okkum fyrrenn í 2020, so var hann við til at tryggja ÍF lívið í bestu deildini, har hann millum annað skoraði ímóti 07 Vestur og eftir hendan dystin bleiv avgjørt at 07 Vestur ikki flutti upp.

Sæð útfrá hagtølunum, so er Jens ein aktivur leikari. Í bestu deildini hevur hann spælt 214 dystir, skorað 13 mál og hevur fingið 70 gula og 7 reyð kort.

Sjálvt um Jens hevur fingið nógv kort, so hevur hann samband langt inn í dómaraheimin. T.d. er vert at nevna 31. juli 2016 hátíðarhildu Jens og Bjarki Danielsen (gamli ÍF-arin og núverðandi dómarin) 7 ára vinarlag á Facebook.


OKKARA KJARNUØKI
GRANNSKOÐAN
ROKNSKAPARHJÁLP
SKATTUR
VIRKISRÁÐGEVING
BÓKHALD
MEIRVIRÐISGJALD
Skalt tú meta um framtíðina, mást tú kenna fortíðina.
Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI
WWW.JANUAR.FO
SENDISTOVAN


Allar vanligar umvælingar
Dekksøla
Viðlíkahald
Bilverkstaðið á Kambsdali
Tlf. 441111


A Member of The Linde Group
AGA-FØROYAR
ESAB
FROZEN
AGA - Føroyar/www.AGA.fo/Akranesgøta 2/FO-100 Tórshavn/Tlf + 298 - 315544/AGA@AGA.fo

# NEVNDIN HJÁ ÍF

## kappingarárið 2020/21



*Frá vinstru: Magnus Jørmundsson (peningarøkil), Katrin Madsen (nevndarlimur), Georges Rouah (formaður), Leif Andre Eliasen (Næstformaður) og Jóhan S. Ellingsgaard (skrivari).*



*Fráfarandi formanninum, Dan Petersen Nýggi formaðurin hjá ÍF, Georges Rouah*

multiputl
Vit sveisa vinyl, gera HVS arbeiði
og putlast við alt møguligt annað ...
tel. +298 207575 | multiputl@multiputl.fo



Bilasølan
Vegurin Langi 43 | 188-Hoyvík | 359700 | bilasolan.fo
.com/bilasolan .com/bilasolan



UNDANFARNA UMFAR



1. UMFAR

**TEKST:** EIVIN BREIÐASKARÐ - **MYND:** PALLI VANG

# Skála - ÍF

**Eftir ætlan skuldi kappingarárið 2020 skjótast í gongd 8. mars. Vegna korona og covid-19 bleiv hetta tó av ongum. Eftir langa bíðitíð og ógreið útlit fyri hvussu, landskappingin 2020 og um landskappingin 2020 yvirhøvur skuldi spælast, rullar fótbólturin aftur í Føroyum.**

Undir Mýrihjalla á Skála brustu Skála og ÍF saman í 1.umfari, sum bleiv leikt leygardagin 9. maj. Undan dystinum varð stórur spenningur, tí mestsum allur ítróttur og serliga liðítróttur hevur verið í einari bíðistøðu í uml. 2 mánaðir vegna korona og teimum tilmælum, sum blivu sett í verk í mars.

Dysturin háttaði seg soleiðis, at tað leikti javnt á mestsum alla tíðina. Ikki nógvir stórir málmøguleikar vórðu í dystinum, sum bleiv leiktur eitt sindur



varið. Tó varð tað ÍF-liðið sum fekk hol á fyrst. Nýggji target-maðurin í álopinum hjá ÍF skoraði eftir 23. minuttum eftir uppleggi frá einum øðrum nýggjum leikara, Sjúrður Paula Nielsen.

ÍF varð á odda 1-0, tá ið farið varð til hálvleiks. Ein støða sum nokk lýsti leikgongdina í dystinum.

Seinni hálvleikur varð gott 10 minuttir gamal, tá ið Uros bleiv tvífaldur málskjútti. Hetta eftir uppleggi frá Filip Djordjevic, sum eisini er ein av teimum nýggju leikarunum til hetta kappingaári.

Skála minkaði um munin eftir 83. min, tá ið ungi Poul Kallsberg skoraði við fløtum skoti frá brotsteigarmarkinum.

Tá ið dómarin løtu seinni bríkslaði dystin av, høvdu okkara leikarar fingið ein góðan 2-1 útisigur í hús. Eitt sera gott úrslit á einum leikvølli, har tað ofta hevur verið trupult at fingið nakað sum helst burturúr.

Ein frálíkur útisigur til okkara dreingir, sum hava lagt væl frá landi í kappingarárinum 2020.

Eisini ein góð byrjan til nýggju leikararnar í hópinum, og serliga Uros Stojanov, sum fekk 2 mál í dystinum.

Hjartaliga tillukku til allar leikararnar, venjaratoymi og hini sum eru um liðið.

Vónandi varð hetta byrjanin til eitt gott og spennandi kappingarár, har ÍF-liðið fer at blanda seg meira uppí kappingina um tær betru plaseringarnar í mun til kappingarárið 2019. Hetta varð fyrsti útisigur ella sigur yvirhøvur hjá ÍF síðani 28. apríl 2019.

# „Vit eru ÍF-fan“

## SYNGIÐ VIÐ

Í Fuglafirði mangan dystin leika
Í reyðum, hvítum klæðum eru tit
Á vølli allir leikarar nú reika
Og vinna dystin – ja, tað vilja vit.

**Vit eru ÍF-fan**
**Vit vita hvat ein kann**
**Vit eru best, og vinna hvat sum helst**
**Vit hava sett sum mál, at vinna hvørja sál**
**Nú Fuglafjørður hevur nátt sítt mál.**

Í deildini vit skulu verða bestir
Og vinna alt ið vinnast kann í dag
Jú, ÍF-leikarar teir eru treystir
Og fólkini tey gerast øll so glað.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Á vøllinum vit skulu standa saman
Um tað nú ikki gongur sum tað skal
Á bakkanum í álvara og gaman
Og vóna at tað gondur okkum væl.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Vit armarnar í lofti nú upp hevja
Og kunnu ikki standa her í frið
Tá sjálvandi vit gullið kunnu tevja
Nú eiga vit jú Føroya besta lið.

**Vit eru ÍF-fan ...**

**TAKKAR FYRI STUÐULIN**